## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, Móti kvøldi minni vindur av suðri, turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt, men mjørkaflókar. Út á seinnapartin veksur hann vindin til hvassan vind og sirm ella mjørki. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og fyrrapartin sirm ella mjørki, men seinnapartin klárari í veðrinum. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, týsdagin snarar hann í útsynning. Stundum regn ella ælingur og hitin millum 9 og 13 stig.

# Hevur ligið við Toftavatn í meira enn 10.000 ár

NÁTTÚRUFYRIBRIGDI
*Vilmund Jacobsen*



*Ein risastórur steinur dygst við Toftavatn — ein ísborin steinur, sum jarðfrøðingar rópa tað.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hevur tú eitt vakið eyga og alsk til tað, sum livir og andar rundan um teg, er føroyska náttúran ein stórur fongur. Men eisini teir »deyðu« steinarnir, stórir og smáir, kunnu vekja tínar tankar og kenslur um ymiskt, sum knýtir teg at ávísu støðunum í náttúruni.

Kanska hevur tú einaferð rindað møðina og etið ein matpakka her, ella tú sat her eina skýmingarløtu saman við henni, tú var hugtikin av. Kanska var hetta staðið eitt afturvendandi mál, har tú í tínum góðu ella minni góðu løtum stóðst á sílabergi og hugsaði um lívið – ella deyðan.

### Ísborin steinur

Áhugaverdu fyribrigdini í náttúruni eru mong, og loyndarmálini verða ongantíð uppi.

Risastóri steinurin, vit síggja á hesi myndini, liggur við eystaru síðu á Toftavatni, dygst niðri við sjóvarmálan. Tú setir bilin við Mýrarnar og gongur oman, har eitt seyðahús stendur beint undir vegnum. Tað umgongs ikki, at tú gongur beint oman á nakrar stórar klettar, har hesin er tann størsti og niðasti.

Men hvaðani er so hesin risastóri steinurin komin? Allan vegin niðan undir vegin á Mýrunum er ikki steinpirra, men vallað lendi. Eystanfyri vegin er heldur einki grót at síggja og enn minni nakar hamari, haðani steinurin kann vera komin.

Steinurin kann tískil bara vera borin av ísi – ein ísborin steinur, sum jarðfrøðingar rópa tað.

Og hesir eru ikki so fáir ymsastaðni kring landið. Teir eru eyðkendir, tí teir liggja soleiðis, at teir ikki kunnu vera komnir av omanlopi ella stava frá øðrum fyribrigdum í náttúruni.

### Ligið í 10.000 ár

Tað kann tykjast undarligt at bera eina slíka søgu, sum er fleiri túsund ára gomul. Kortini er hon áhugaverd, tá ið tú gevur tær far um hana.

Martin Heinesen, jarðfrøðingur, sigur, at steinurin við Toftavatn er ein »typiskur« ísborin steinur, ið væntandi stavar frá seinastu ístíðini, sum endaði fyri umleið 10.000 árum síðan.

Tískil kunnu vit rokna við, at steinurin hevur ligið við Toftavatn í meira enn 10.000 ár og er sæddur av øllum, ið hava spákað sær fram við vatninum, síðan Føroyar vórðu bygdar.

Jarðfrøðingar meta, at seinasta ístíðin vardi í meira enn 100.000 ár.

Martin sigur seg ikki hava »repeterað« hesi árstølini, nú vit høvdu hann í telefonini og vísir á, at tað eru aðrir jarðfrøðingar, ið kundu sagt okkum tølini neyvari.

– Fleiri ístíðir hava verið og tískil eisini fleiri millumístíðir. Jarðfrøðingar meta, at ístíðirnar hava vart nógv longri enn millumístíðirnar. Í dag liva vit í eini millumístíð, sigur Martin Heinesen.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | 19 |
| Halifax | 26 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 13 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 22 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 18 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 26 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 26 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 31 |
| Malta | – |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 33 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 989 hPa vestan fyri Skotland fer í landnyrðing norðan og hevur nógvan vind við sær á okkara leiðum.




Lágtrýstið norðanfyri Føroyar hvørvur norðureftir, men eitt annað lágtrýst í útsynning úr Írlandi fer spakuliga í landnyrðing og dýpist.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/08 kl. 06[00]– 15/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,7°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 14/08 kl. 06[00]– 15/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 24,0 mm

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT

## VESTFALLSKYRRINDI

10. aug.: Mánin næstur jørðini
15. aug.: Fyrra kvarter
22. aug.: Fullmáni
26. aug.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. aug | 01.39 | 14.19 | 00.39 | 13.19 | 00.54 | 13.34 | 03.39 | 16.19 | 04.39 | 17.19 | — | 12.34 | 11.34 | — | 01.54 | 14.34 | 02.54 | 15.34 | 01.24 | 14.04 | 02.39 | 15.19 |
| 17. aug | 02.58 | 15.25 | 01.58 | 14.25 | 02.13 | 14.40 | 04.58 | 17.25 | 05.58 | 18.25 | 01.13 | 13.40 | 00.13 | 12.40 | 03.13 | 15.40 | 04.13 | 16.40 | 02.43 | 15.10 | 03.58 | 16.25 |
| 18. aug | 03.52 | 16.18 | 02.52 | 15.18 | 03.07 | 15.33 | 05.52 | 18.18 | 06.52 | 19.18 | 02.07 | 14.33 | 01.07 | 13.33 | 04.07 | 16.33 | 05.07 | 17.33 | 03.37 | 16.03 | 04.52 | 17.18 |
| 19. aug | 04.44 | 17.10 | 03.44 | 16.10 | 03.59 | 16.25 | 06.44 | 19.10 | 07.44 | 20.10 | 02.59 | 15.25 | 01.59 | 14.25 | 04.59 | 17.25 | 05.59 | 18.25 | 04.29 | 16.55 | 05.44 | 18.10 |

5 707265 100050 >